Fjølmiðlanevndin

28. mai 2026

Dennis Holm

**Kæru um søgu í Kringvarpi Føroya og á kvf.fo tann 18. desember 2025**

Fjølmiðlanevndin hevur móttikið kæru tína hin 12. februar 2026 um søgu í Kringvarpi Føroya og á kvf.fo tann 18. desember 2025.

Tú metir, at Kringvarp Føroya hevur framt brot á góðan fjølmiðlasið við at bera fram ósannar upplýsingar og grovar ákærur móti tær. Tú kærir somuleiðis um, at tú ikki er sloppin at svara.

Fjølmiðlanevndin hevur á fundi 7. mai 2026 viðgjørt kæru tína. Til at viðgera kæru tína var Fjølmiðlanevndin mannað við Ingrid Bjarnastein, forkvinnu, Anniku Im, tíðindafólki, Annu Paulinu Leo Olsen, akademiskum fyrisitara og Jan Sjóstein, løgfrøðingi.

Ein samd nevnd hevur tikið avgerðina.

**Lógargrundarlag**

Løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007 (fjølmiðlaábyrgdarlógin).

Góður fjølmiðlasiður byggir á leiðreglurnar um góðan fjølmiðlasið frá 14. mai 2008.

**Kæra til Kringvarp Føroya**

Í fjølmiðlaábyrgdarlógini § 34, stk. 1 er ásett, at tann, ið heldur seg líða órætt vegna brot á góðan fjølmiðlasið framt av Kringvarpi Føroya, skal kæra beinleiðis til Kringvarp Føroya.

Tú hevur kært til Kringvarp Føroya tann 18. desember 2025 og sent Kringvarpi Føroya eina ískoytiskæru tann 4. januar 2026.

Kringvarp Føroya hevur í avgerð hin 16. januar 2026 mett, at brot er ikki framt á góðan fjølmiðlasið í greinini. Kringvarpið heldur seg við presiseringini til greinina tann 18. desember 2025 kl. 10:19 hava gingið kritikkinum hjá tær á møti.

**Sjónarmið partanna**

Niðanfyri er ein samandráttur av sjónarmiðunum hjá pørtunum. Sum kærarin vísir á, er talan um drúgva kæru.

Heimildin hjá Fjølmiðlanevndini at taka avgerð í málum um brot á góðan fjølmiðlasið fevnir, eftir sínum endamáli, ikki um yvirskipað redaktionel val t.d. um nær ein grein verður almannakunngjørd, ella hvønn vinkul redaktiónin velur.

Samandrátturin endurtekur tey sjónarmið, sum verða mett viðkomandi fyri spurningin um møguligt brot á góðan fjølmiðlasið og rættin hjá tí, sum verður viðgjørdur í fjølmiðlunum, at svara aftur.

**Kærarin**

Kærarin vísir á, at tað er ósatt, tá ið Kringvarpið tann 18. desember 2025 skrivaði, at " [Kærarin saman við øðrum persóni] selja Vaskiskúrin til landskassan fyri aðru ferð".

Kærarin eigur einki í Vaskiskúrinum, og tað er somuleiðis ósatt, tá ið Kringvarpið í somu grein í innleiðandi tekstinum skrivar, at "Fyrst var tað Ítróttaháskúlin, nú er tað Maritimur Mentanardepil. Seljararnir eru teir somu [...], sum nú fáa eina millión úr landskassanum fyri ómakin."

Kærarin vísir á, at hvørki yvirskriftin ella innleiðandi teksturin eru í samsvari við innihaldið í greinini. Bæði yvirskriftin og innleiðandi teksturin leggja upp til, at tað eru kærarin og annar navngivin persónur, sum eiga umrøddu ognina, og sum fáa eina millión úr landskassanum fyri at selja.

Hetta er beinleiðis skeivt, og rætti samanhangurin framgongur ongastaðni í greinini.

Kærarin váttar, at teksturin í greinini er í samsvari við veruleikan, tí tað er rætt, at Ítróttaháskúlin arbeiddi við at gera skúlabygning í Vaskiskúrinum á Gørðunum, ein ætlan, sum datt niðurfyri – og tað er eisini rætt, at tað nú verður arbeitt við at gera grindabátaneyst, savn og bátaverkstað í sama bygningi. Men yvirskriftin og innleiðandi teksturin eru ikki sonn og beinleiðis villeiðandi, tá ið hugsað verður um tekstin í greinini sjálvari.

Ósannindini í greinini verða endurtikin í Breddanum sama dag, har tað verður endurtikið, at kærarin og annar navngivin persónur "fáa eina millión frá landskassanum".

Í útvarpstíðindunum kl. 12.20 verður søgan eisini lisin, og tá verður greitt frá, at roynt verður at fáa Landskassan at keypa Vaskiskúrin á øðrum sinni.

Kærarin vísir á, at tað er heldur ikki í samsvari við veruleikan, tí talan er ikki um eina áheitan til Landskassan um at keypa Vaskiskúrin.

Kærarin ger vart við, at hann varð ikki biðin um at gera viðmerking til søguna, tá hon varð borin fram í útvarpstíðindunum kl. 12.20 tann 18. desember 2025, góðar 11 tímar eftir, at søgan varð løgd á kvf.fo, og at hann framvegis ikki eri sloppin til orðanna.

**Kringvarp Føroya**

Kringvarpið vísir á, at tað hevði týdning at gera hasa søguna, júst tá:
Málið var háaktuelt, partur av uppskotinum til fíggjarlóg, sum kom til 3. viðgerð og endaliga atkvøðugreiðslu 18. desember. Aktualiteturin hevði farið úr søguni, um hon varð skrivað seinni. Greiðar ábendingar vóru um, at talan var um nýggjar upplýsingar fyri almenningin og møguliga eisini lóggevarar í løgtinginum. Talan var um eitt – sambært Kringvarpinum - mynstur, har somu persónar royndu at "selja" sama bygning til okkurt endamál, har landskassin skuldi gjalda, fyrst ítróttarskúla og nú til maritiman mentanardepil.

Málið byrjar til fíggjarlógarviðgerðina í løgtinginum týsdagin 16. desember. Tá kemur undan kavi, at kærarin hevur ein dupultleiklut í málinum um milliónina til Maritima Mentanardepilin í Vági. Kærarin er kassameistari í Vágs Sóknar Bygdasavni, sum bað fíggjarnevndina hjá løgtinginum um eina millión krónur, sum skuldu brúkast at keypa ein ávísan bygning í Vági. Og hann er limur í fíggjarnevndini, sum viðgjørdi og mælti løgtinginum til at játta milliónina. Hetta frættist undir 2. viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum, uttan at nakar tó leggur prógv á borðið.

Kringvarpið ger søguna til tíðindini týskvøldið kl.18. Kærarin váttar, at hann er kassameistari í Vágs Sóknar Bygdasavni. Og hann váttar eisini, at hann ikki upplýsti hini í fíggjarnevndini um tað, tá tey viðgjørdu umbønina og játtaðu pengarnar. Hann helt ikki tað vera neyðugt, sigur hann í samrøðuni við Kringvarpið.

Kringvarpið vísir á, at í tíðindunum kl. 12:20 mikudagin 17. desember 2025 váttar fíggjarnevndarforkvinnan, at hon visti ikki um dupultleiklutin hjá kæraranum. Hon heldur tað vera "óheppið" og vil taka tað upp í fíggjarnevndini.

Kringvarpið hevur fingið váttað, at fíggjarnevndin hvørki hevur kannað umstøðurnar á staðnum ella tosað við nakran av umsøkjarunum, áðrenn pengarnir vórðu játtaðir. Og, sum nevnt, visti nevndin ikki, at ein av fíggjarnevndarlimunum sjálvur er umsøkjari.

Seinni sama mikudag/-kvøld koma ábendingar um, at hetta ikki er fyrstu ferð, at júst hesin bygningur í Vági er partur av ætlanum, har biðið verður um pengar úr landskassanum. Ein líknandi støða var, tá fíggjarlógin fyri 2022 skuldi samtykkjast móti ársenda í 2021.

Eitt sindur av reserach vísir søguna um navngivnan vinnulívsmann og kæraran. Fyrrnevndi sum eigari av bygninginum, ið fær ein stóran, fíggjarligan vinning burtur úr eini sølu. Hin sum tann, ið skal selja hugskotið til fíggjarnevndina hjá løgtinginum at játta pengar til.

Viðvíkjandi kæruni um, at kærarin ikki er biðin um at gera viðmerkingar til søguni, vísir Kringvarpið á, at tað er vanligt at fyrihalda høvuðspersónum kritikk, ið førdur verður fram ímóti teimum, men at í hesum føri er støðan tó eitt sindur serlig.

Endamálið við hesi greinini á kvf.fo tann 18.desember kl. 01:08, sjálvur vinkulin, er at lýsa eitt mynstur. Ein arbeiðshátt, har farið verður beinleiðis inn í fíggjarnevndina hjá løgtinginum at biðja um pengar til ymiskar verkætlanir, sum peika aftur á sama, gamla bygning, ið skal keypast fyri skattakrónur.

Talan er um faktuell viðurskifti, sum "leypandi" koma undan kavi við research í einum sera aktuellum máli. Tvs., at søgan útviklar seg, samstundis sum aktualiteturin fer úr søguni eftir 3. viðgerð í løgtinginum 18. desember.

Kringvarpið tosaði við kæraran til tíðindasendingina týskvøldið 16. desember kl. 18. Tá var vinkulin hansara dupultleiklutur sum bæði umsøkjari og fíggjarnevndarlimur. Kringvarpið hevði ikki aðrar upplýsingar um málið tá.

Tað eru sjálvandi spurningar, ið kundu verið settir kæraranum í framhaldi av greinini á kvf.fo 18. desember. Men havandi í huga umstøðurnar, útviklingina í søguni og skotbráið, er Kringvarpið av teirri fatan, at greinin kann standa einsamøll uttan viðmerkingar.

Kærarin sendir sama morgun, 18. des. kl. 09:48, eina kæru til stjóra og tíðindaleiðara í Kringvarpi Føroya. Kringvarpið valdi beinanvegin at koma við eini presisering, ið varð løgd út ovast í somu grein. Tað varð gjørt 18. desember 2025. kl.10:19. Orsøkin er stutt sagt, hvønn týdning fólk kunnu hugsast at leggja í orðið "selja", sum stendur í yvirskriftini.

Kringvarpið metir, at tað er vanligt talumál at selja eitt hugskot, selja eina idé. Í hesum føri eru tað somu tveir persónar, sum á øðrum sinni royna at selja hugskotið um at brúka Vaskiskúrin á Gørðunum til ymiskt, har ein fortreyt eru pengar úr landskassanum. Og í ítøkiliga málinum hevur fíggjarnevndin altso mælt løgtinginum til at játta  pengarnar – tí stendur í undirrubrikkinum, at teir nú fáa eina millión fyri ómakin.

Í greinini verða smálutirnir lýstir rímiliga neyvt, eisini um ognarviðurskiftini. Faktuellu viðurskiftini, sum eru nevnd í kæruni, eru øll lýst í greinini.

Tá Kringvarpið kortini valdi at koma við eini presisering, er tað fyri at skera omanfyri lýstu viðurskifti út í papp. Av somu orsøk var orðið "selja" í yvirskriftini eisini sett í gásaeygu.

Eftir stendur kritikkurin um yvirskriftina og undirrubrikkin, sum kærarin lýsir sum skeivan og villeiðandi.

Omanfyri er lýst, hví Kringvarpið valdi at orða seg soleiðis, og hví Kringvarpið morgunin eftir valdi at orða eina presisering  til júst yvirskrift og undirrubrik.

Í mun til hetta skal Kringvarpið leggja afturat:

1) Tað er fakta, at seljari fær eina millión úr landskassanum fyri gamla Vaskiskúrin, um sølan verður framd. Tí sjálvt um tað er Vágs Sóknar Bygdasavn, sum skal keypa bygningin, so er tað landskassin, sum skal gjalda pengarnar umvegis eina stuðulsjáttan til Vágs Sóknar Bygdasavn.

2) Kærarin er "sølumaðurin", sum í tveimum umførum hevur agiterað fyri fíggjarnevndini hjá løgtinginum, at tað er eitt sera gott hugskot at keypa júst henda bygningin. Og hugsast kann, at hann sum fíggjarnevndarlimur eisini hevur roynt at selt hugskotið til hinar nevndarlimirnar.

3) Kærarin er kassameistari í felagnum, sum skal keypa bygningin fyri pengarnar úr landskassanum. Sett eitt sindur á spíssin, so kann man siga, at kærarin er sølumaðurin, sum selir hugskotið til fíggjarnevndina, sum so játtar eina millión til kæraran sum kassameistara at keypa fyri.

Samanumtikið heldur Kringvarpið, at tað eigur at vera pláss til so frægt av journalistiskum frælsi, at man kann tekna myndina rímiliga greiða í eini yvirskrift og undirrubrikki, tá øll fakta verða lýst í somu grein. Men, sum longu nevnt, valdi Kringvarpið kortini at koma við eini presisering, tá ivi nú bleiv sáddur um, hvønn týdning fólk nú leggja í orðið at "selja". Við hesum metir Kringvarpið seg longu at hava gingið kritikkinum hjá kæraranum á møti.

Kærarin finst eisini at Kringvarpinum fyri ikki at hava fylgt søguni upp við at loyva honum at gera viðmerkingar til søguna. Í mun til hetta skal Kringvarpið viðmerkja, at luftin fór nakað úr søguni, tá ið umsøkjararnir tóku umsóknina aftur um at fáa eina millión kr. aftur í kjalarvørrinum á tíðindaflutninginum, sum hevði verið um málið. Og harumframt tók kærarin seg aftur sum kassameistara í felagnum. Hetta varð lýst í tíðindasendingini á middegi tann 18. desember, har endurgivið var úr tíðindaskrivi, sum kærarin hevði sent út, og sum hevði yvirskriftina: "Kringvarpið lýgur um mín persón".

Í grein á kvf.fo varð eisini endurgivið úr tíðindaskrivinum, eins og leinkjað varð beinleiðis til tíðindaskrivið á lesarin.fo. Sostatt metir Kringvarpið, at kærarin er nøktandi endurgivin fyri síni sjónarmið í mun til greinina, og tá ið viðurskiftini blivu sum tey blivu, og umsóknin varð trekt aftur og kærarin trekti seg sum kassameistara, var luftin farin úr søguni, og tí kom eingin uppfylging til søguna.

Samanumtikið heldur Kringvarpið, at tá orðið "selja" í yvirskriftini ikki stóð í klombrum, var vandi fyri, at lesarar misskiltu týdningin av hesum myndamáli. Kringvarpið rættaði hetta við at seta gásaeygu um, og við at skriva eina presisering.

Við hesum heldur Kringvarpið seg eisini hava gingið kritikkinum hjá kæraranum á møti.

**Fjølmiðlanevndin**

Partarnir eru í høvuðsheitinum samdir um, at sjálvt innihaldið í greinini er í samsvari við veruleikan.

Kæran snýr seg fyrst og fremst um, um tað er brot at góðan fjølmiðlasið (pkt. 4.4 í fjølmiðlaetisku leiðreglunum um samsvar millum yvirskrift og innihald í tilfarinum), tá tað í yvirskriftini stendur, at

kærarin selur eina ogn, hóast kærarin ikki var eigari av ognini og tí ikki fekk persónligan vinning, um ognin varð seld.

Í øðrum lagi snýr kæran seg um rættin hjá tí, sum er fyri skotum, at svara aftur (pkt. 4.14 í fjølmiðlaetisku leiðreglunum) og meginregluna um rættin at sleppa at svara aftur samstundis, tá ið tað snýr seg um ítøkiligar upplýsingar (pkt. 4.13 í fjølmiðlaetisku leiðreglunum).

Fjølmiðlanevndin skal innleiðandi viðmerkja, at mál um møguligan dupultan leiklut og egin áhugamál hjá fólkavaldum persónum vanliga hava almennan áhuga, og at persónur, sum í sínum yrki eru alment kendur, eigur at tola meira av kritiskari umtalu enn onnur.

*Samsvar millum yvirskrift og innihald*
Viðvíkjandi samsvari millum yvirskrift og innihald viðmerkir Kringvarpið, at ein presisering varð gjørd vísandi til, at ymiskt er, hvønn týdning fólk kunnu hugsast at leggja í orðið “selja”, sum stendur í yvirskriftini.

Í presiseringini gjørd sama dag kl.10:19 stendur soleiðis:
“Í yvirskriftini og undiryvirskriftini brúka vit orðið “selja”. Tað hevur fingið lesarar at reagera. Tí henda presisering. Við orðingini meinast, at nevndu persónar selja hugskotið, hvat hesin gamli bygningur á Gørðunum í Vági eigur at vera brúktur til. [Annar persónur] eigur bygningin gjøgnum sítt íverksetarafelag. [Kærarin] hevur í tveimum umførum roynt at sannføra landsins myndugleikar um, at tað er eitt gott hugskot at brúka pengar upp á júst henda bygningin. Í báðum føri er talan um, at skattakrónur skulu brúkast til at keypa bygningin, ávikavist til skúla og nú til maritiman mentanardepil. Hetta er alt lýst í greinini.”

Fjølmiðlanevndin skal viðmerkja, at tað ikki er í samsvari við fjølmiðlaetisku leiðreglurnar um at yvirskriftir og ávísingar skulu samsvara við innihaldið í tilfarinum, tá Kringvarpið í yvirskrift skrivar, at kærarin saman við øðrum persóni selur Vaskiskúrin til landskassan fyri aðru ferð.

Yvirskriftin gevur lesaranum ta fatan, at kærarin tvær ferðir hevur roynt at selja eina og somu ogn við persónligum vinningi fyri eygað.

Fjølmiðlanevndin metir, at tað ivasamt, um tað er nøktandi rættting, at orðið “selja” verður sett í gásaeygu.

Fjølmiðlanevndin metir, at tá orð ella hugtøk verða nýtt í eini yvirskrift, og hesi ítøkiliga eru egnað til at geva ta fatan, at tann, sum stendur fyri skotum, møguliga hevur handlað við egnum vinningi fyri eygað ella fyri at røkja onnur egin áhugamál, eigur rættingin ella presiseringin at vera so mikið greið og eintýðug, at rættaða yvirskriftin samsvarar við innihaldið. Innihaldið í rættleiðingini tilskilar greitt, at kærarin ikki hevur ætlað at selt eina ogn, sum hann eigur í, við egnum vinningi fyri eygað. Rættaða yvirskriftin er hinvegin framvegis tvískild, og Fjølmiðlanevndin metir ikki, at tað í hesum føri gevur ikki nøktandi greidleika, at orðið søla verður sett í gásaeygu.

*Kærarin ikki biðin um at gera viðmerkingar*

Viðvíkjandi kæruni um, at kærarin ikki er biðin um at gera viðmerkingar til søguna, vísir Kringvarpið á, at tað er vanligt at fyrihalda høvuðspersónum kritikk, ið førdur verður fram ímóti teimum, men at í hesum føri er støðan tó eitt sindur serlig. Kringvarpið vísir á, at endamálið við greinini á kvf.fo 18.desembur kl. 01:08, sjálvur vinkulin, er at lýsa eitt mynstur. Ein arbeiðsháttur, har farið verður beinleiðis inn í fíggjarnevndina hjá løgtinginum at biðja um pengar til ymiskar verkætlanir, sum peika aftur á sama, gamla bygning, ið skal keypast fyri skattakrónur. Talan er um faktuell viðurskifti, sum "leypandi" koma undan kavi við research í einum sera aktuellum máli. Tvs., at søgan útviklar seg, samstundis sum aktualiteturin fer úr søguni eftir 3. viðgerð í løgtinginum 18. desember.

Kringvarpið tosaði við kæraran til tíðindasendingina týskvøldið 16. desember kl. 18. Tá var vinkulin hansara dupultleiklutur sum bæði umsøkjari og fíggjarnevndarlimur. Kringvarpið hevði ikki aðrar upplýsingar um málið tá.

Kringvarpið viðmerkir, at tað eru sjálvandi spurningar, ið kundu verið settir kæraranum í framhaldi av greinini á kvf.fo 18. desember. Men havandi í huga umstøðurnar, útviklingina í søguni og skotbráið, er Kringvarpið av teirri fatan, at greinin kann standa einsamøll uttan viðmerkingar.

Fjølmiðlanevndin metir, at tá talan er um eina søgu, sum er sera atfinningarsom og m.a. viðger møgulig fíggjarlig áhugamál og sonevndan dupultan leiklut, eigur tann, sum stendur fyri skotum, at fáa møguleika at gera viðmerkingar, áðrenn søgan verður almannakunngjørd ella, eftir umstøðunum, skjótast møguligt aftaná. Tað eru ikki viðurskifti í hesum máli, sum gera, at tað var óneyðugt ella trupult hjá Kringvarpinum at fáa eina viðmerking frá kæraranum. At søgan stutt aftaná hevði mist nakað av sínum aktualiteti er ikki haldgóð grundgeving fyri at víkja frá rættinum

hjá tí, sum stendur fyri skotum, at gera viðmerking. Fjølmiðlanevndin metir heldur ikki, at tað undir hesum umstøðum er nóg mikið at endurgeva og vísa til tíðindaskriv frá kæraranum.

**Fjølmiðlanevndin metir, at Kringvarp Føroya ikki hevur hildið góðan fjølmiðlasið við at bera fram uppáhald um egin áhugamál í sambandi við sølu av ogn og um dupultan leiklut hjá kæraranum uttan at biðja um viðmerking og uttan at geva kæraranum høvi at svara aftur skjótast til ber.**

**Fjølmiðlanevndin metir somuleiðis, at neyðugt samsvar ikki var millum yvirskrift og innihald í greinini á kvf.fo tann 18. desember 2025, og at rættingin, sum varð gjørd sama dag, ikki var nóg greið, serliga við atliti at álvarseminum í teimum uppáhaldum, sum eru førd fram.**

**Fjølmiðlanevndin hevur á hesum grundarlagi avgjørt at geva Kringvarpi Føroya eina átalu fyri søguna í Kringvarpi Føroya og á kvf.fo tann 18. desember 2025.**

*Almannakunngering*

Fjølmiðlanevndin kann áleggja viðkomandi fjølmiðli at almannakunngera úrskurðin skjótast til ber á slíkan hátt og í vavi, sum Fjølmiðlanevndin metir vera nøktandi. Almannakunngeringin skal fara fram uttan viðmerkingar og skal vera so sjónlig, sum eftir umstøðunum er rímiligt at krevja. Víst verður til § 49 í løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021

**Kringvarpi Føroya verður álagt at almannakunngera úrskurðin skjótast til ber á heimasíðuni og at lesa niðurstøðuna hjá Fjølmiðlanevndini í tíðindunum á middegi mánadagin 1. juni 2026.**

Fjølmiðlanevndin, 28. mai 2026

Ingrid Bjarnastein
forkvinna